**Starv**

# Skrivstovufólk




**Avloysarastarv**
Í sambandi við barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir einum avloysara, til starvið sum skrivstovufólk á fólkaflutningsdeildini, í umleið 1 ár.

**Uppgávurnar hjá fólkaflutningsdeildini**
Fólkaflutningsdeildin skal veita eina úrslitagóða fyrisiting innan fólkaflutningstænastu, herundir samskipa, viðlíkahalda og mennastýringina innan fólka- og akfarsflutningin hjá fyritøkuni.

Virksemið á deildini fevnir um hesar høvuðsuppgávur:

- Planlegging
- Rakstur (skip og bussar)
- Ferðslusamskipan
- Ferðaseðlasamskipan

**Uppgávur hjá tí, ið sett/ur verður**
Uppgávurnar hjá skrivstovufólkinum verða m.a. at taka sær av:

- Avrokningum til privatu arbeiðstakararnar
- Elektronisku skúlakortunum
- At avlesa modulir til Buscom-skipanina
- Skaðafrágreiðingum v.m.
- Fyrifallandi uppgávum á skrivstovuni
- Vanligari kundavgreiðslu

**Førleikakrøv**

- Góðan tænastuhugburð
- Góðan edv-kunnleika
- Málrættað/ur
- Góðan røkjuskap
- Góð samstarvsevnir
- Fyrimunur er, um tann, ið settur verður, hevur royndir og kunnleika innan bókhaldsskipanina Navision
- Góð evnir at orða seg bæði skrivliga og munnliga á føroyskum.

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið, og er lønt í lønarflokki 2.

Tað er ynskiligt, at tann, sum settur verður, kann byrja 1. mars 2003.

**Umsóknir**
*Umsókn við próvskjølum skal sendast til:*
*Strandfaraskip Landsins*
*att. Starvsfólkadeildin*
*Boks 88*
*FO-110 Tórshavn*
og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 24. januar 2003.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú seta teg í samband við Guðrið Ellefsen, á tlf. 34 30 00 ella á e-post: *gue@ssl.fo*.

Strandfaraskip Landsins er ein lands-fyritøka undir Vinnumálastýrinum / Samskiftisdeildini.

Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.

Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 150 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 11 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.

STRANDFARASKIP LANDSINS

34 30 00 · www.ssl.fo

REPROZ

# Almannastovan

## Stuðulsfólk

Almannastovan søkir við hesum eftir stuðulsfólki.
Sum stuðul fært tú eitt sjálvstøðugt og fjølbroytt starv.

**Arbeiðið fevnir m.a. um:**
Fylgjarauppgávur Stimbran
Familjuráðgeving Umlætting

**Størvini eru hesi:**

**Í Eysturoy**
1) at stuðla einum 5 ára gomlum barni. Tímatalið er 20 tímar um vikuna. Stuðulin hevur vanliga tilhaldsstað á dagstovni. Veitt verður eisini stuðlinum ráð- og vegleiðing. Játtanin er fyribils til 30.06.03.

2) at stuðla og stimbra einum 4 ára gomlum tunghoyrdum drongi í gerandisdegnum. Arbeiðið fer fram í Dagstovninum í Gøtu.
Tímatalið er 30 tímar um vikuna og er játtanin fyribils galdandi til 31.12.03.

**Í Norðurstreymoy**
3) at stuðla og hjálpa einum 8 ára gomlum drongi í samskiftinum við onnur børn, stimbra honum við venjingum og spæli, einsamøllum og saman við øðrum. Arbeiði hjá stuðlinum verður aftaná skúlatíð hjá dronginum og við tilknýti til Barnagarðin í Hvalvík.
Tímatalið er 20 tímar um vikuna og er játtanin fyribils galdandi til 31.07.03

Setanarviðurskiftini eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag í mun til uppgávuna.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Ragnhild Dahl, Petru Joensen og Sigrun Bærentsen á tlf.nr. 35 35 10, gerandisdagar millum klokkan 09.00 og 13.00, tó ikki mikudag.

Umsóknir saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum, skulu verða Almannastovuni, J. Broncksgøta 27, Postboks 3096, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 25.01.2003.

**Í umsóknini skal vera tilskilað uppgávunummar.**




Byrjað verður aftur at dansa sunnukvøldið 12. januar kl. 19.00. í Bygdarhúsinum í Hósvík



Dansifelagið
**FRAGDIN**

Sosialurin -tað loysir seg

# ítróttur

Nr. 7 • leygardagur • 11. januar 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Mest spennandi í Klaksvík



*Kvinnurnar hjá Stjørnuni liggja á triðja plássi, og leygardagin kemur VÍF, sum liggur á øðrum plássi, á vitjan. Hetta er óivað mest spennandi dysturin í hesum umfarinum. VB er framvegis á odda, men munurin niður til næstu liðini er sera tepur*

*Savnsmynd*

**Kvinnurnar hjá VÍF skulu til Klaksvíkar leygardagin at spæla ímóti Stjørnuni. Liðini liggja púra jøvn í stigatalvuni, og bæði hava tørv á sigrinum fyri at hótta oddaliðið VB, sum hevur torføran dyst á Skála. Botndystur verður í Runavík millum Tjaldur og Neistan**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Nú verður farið undir seinna hálvu av landskappingini hjá kvinnum. Stigini eru skorin niður í eina helvt, og hetta hevur við sær, at liðini liggja sera tøtt undan fyrsta umfarinum, sum verður leikt leygardagin.

Tríggir dystir eru á skránni, og teir eru allir áhugaverdir á hvør sín hátt. Allir dystirnir eru fluttir fram til leygardagin, so at eingin dystur er sama dag sum landsdysturin hjá monnunum móti Ísrael.

### Oddadystur í Klaksvík

Í Klaksvík tekur Stjørnan ímóti VÍF. Serliga VÍF hevur verið væl koyrandi seinastu dystirnar, og munurin upp til VB er minkaður í stórum. Nú er støðan tann, at VB er á odda við níggju stigum, meðan VÍF og Stjørnan hava átta stig í part. Kvinnurnar úr Vestmanna hava tó munandi betri málmun.

Tey bæði liðini á øðrum og triðja plássi møtast leygardagin í høllini í Klaksvík. Hesin dysturin er óivað tann mest áhugaverdi í hesum umfarinum. Umframt at tey liggja jøvn í stigatalvuni, so skulu bæði liðini hava ein sigur, so at VB ikki aftur dregur frá.

Bæði liðini fara tí eftir sigrinum sunnudagin, og VÍF er kanska at meta sum ein lítil favorittur frammanundan, tí kvinnurnar úr Vestmanna hava víst styrki í seinastuni. Stjørnan hevur tó áður víst, at tær kunnu basa VÍF. Seinast hesi bæði liðini hittust, vann VÍF stórsigur í Vestmanna.

### VB torføran útidyst

Vágskvinnur skulu hesuferð møta StÍF á útivølli, og hetta er ein sera torførur útidystur hjá oddaliðnum. VB legði ógvuliga hart út í hesum kappingarárinum og vann allar teir fyrstu dystirnar. Men síðani kom stígur í, og hini liðini hava minkað um munin upp til vágbingar.

StÍF er kann framvegis blanda seg í dystin um heiðursmerkini. Liðið liggur bara trý stig aftanfyri VB og við einum sigri sær alt ógvuliga áhugavert út hjá kvinnunum av Strondum.

Væntandi er tó at VB fer at basa kvinnunum hjá StÍF, sum fyrr í ár hava víst, at tær kunnu bíta frá sær. Dysturin verður leiktur leygardagin í høllini á Skála.

### Botndystur í Runavík

Leygardagin hittast bæði botnliðini, Tjaldur og Neistin í høllini í Runavík. Tjaldur hevur bara eitt stig við sær í endaspælið, meðan Neistin er næstniðast við fimm stigum. Tað var óivað ikki ætlanin hjá Neistanum, at tær skuldu liggja so illa fyri, t.v.s. næstaftast í stigatalvuni, nú endaspælið fer at bakkastokki, men tær hava framvegis góðan møguleika at gera seg galdandi.

Tjaldur skal tískil hava okkurt burturúr hesum dystinum. Við einum tapi liggur liði enn meira rótfest í botninum. Við einum sigri kann liðið hinvegin toga seg inn á Neistan og hini liðini.

Neistin hyggur óivað heldur uppeftir enn niðureftir. Neistakvinnur kunnu vinna seg upp á sjey stig við einum sigri, og so eru tær brádliga við í dystinum um heiðursmerki.

# Jokovic fer ikki til Aarhus




*Nocko Jokovic hevur framvegis einki felag at spæla fyri. Samráðingar vóru millum hann og FC Aarhus, men tær eru nú slitnaðar*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Tað verður ikki í FC Aarhus, at Nocko Jokovic fer at spæla fótbólt í vár**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Fyrrverandi HB áleyparin Nocko Jokovic fer ikki at spæla við FC Aarhus. Tað er greitt, eftir at samráðingarnar millum partarnar slitnaðu.

Umboð fyri FC Aarhus siga, at felagið gjarna hevði gjørt sáttmála við leikararan, men partarnir kundu ikki semjast um tað fíggjarliga í sáttmálanum. Við øðrum orðum kundi felagið ikki ganga lønarkrøvunum hjá Jokovic á møti.

Sostatt er Nocko Jokovic, sum hevði ein týðandi leiklut á vinnandi HB liðnum í fjør, framvegis arbeiðsleysur. Hann hevur ikki havt nakran sáttmála, síðan hann vann FM-heitið við HB í heyst.

# 1. deild kvinnur um vikuskiftið

**11.01.02**

Høllin á Skála
14.30 StÍF-VB 1d kv Kristian/Sámal
16.00 StÍF-VB 2d kv Kristian/Sámal

KÍ-høllin
18.30 Stjørnan-VÍF 1dkv Jákup Símun/Hallur
(fluttur fram frá sunnudegnum)

Høllin í Runavík
17.00 Tjaldur-Neistin 1dkv Hannis/Eyðun
(fluttur fram frá sunnudegnum)

# 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 12 | 9 - 0 - 3 | 298 | 257 | 41 | 9 |
| 2 | VÍF | 12 | 8 - 0 - 4 | 280 | 221 | 59 | 8 |
| 3 | Stjørnan | 12 | 7 - 1 - 4 | 260 | 256 | 4 | 8 |
| 4 | Kyndil | 12 | 6 - 0 - 6 | 294 | 293 | 1 | 6 |
| 5 | StÍF | 12 | 5 - 1 - 6 | 278 | 293 | -15 | 6 |
| 6 | Neistin | 12 | 4 - 2 - 6 | 239 | 254 | -15 | 5 |
| 7 | Tjaldur | 12 | 1 - 0 -11 | 238 | 313 | -75 | 1 |